


**Festivaløkið er ment frá í fjør, og umstøðurnar er vorðnar betur at skipa fyri einum tiltaki á økinum**

sjálvur er ikki nóg djúpur til slíkar stórar framførslur, sum verða á festivalinum, so modulir verða løgd afturat frammanfyri. Hetta ger til dømis, at trummusettið fær staðið mitt fyri. Hetta varð eisini gjørt í fjør.

## Betri umstøður til mat

Umstøðurnar í cafeteriahølunum eru broyttar. Síðani festivalin í fjør er nýggi køkurin liðugt bygdur, og tað gevur nú góðar møguleikar at gera mat á staðnum, ístaðin fyri at bera mat inn uttanifrá, sum tey gjørdu í fjør. Rúmliga cafeteriahøllin liggur ímillum innipallin og útipallin, og tað riggar væl at seta seg har at eta ein bita ella hugna sær. Hetta rúmið liggur í veruleikanum mitt í økinum, við beinleiðis atgongd til bæði útipallin, innipallin í salinum, talentpallin og økið frammanfyri Kelduna. Terje sigur, at við tað at nýggi køkurin er komin, er gamla útgongdin afturum húsið burtur, og tí hava tey gjørt eina nýggja gongd til endamálið.

Frammanfyri húsið verður eitt øki, har til ber at hugna sær burturi frá tónleikinum. Her verða mattjøldini: Tvey stór tjøld, eitt við festivalbúffum frá Hotel Norð, og eitt tjald við pizza. Her verður gott pláss at sita inni; og um tað viðrar, verða eisini borð sett upp uttanfyri.

Ymiskt annað verður eisini á hesum økinum, t.d. fer bókhandilin Vitin at hava bóka- og fløgusølu, og onnur søla verður eisini.

## Nýggj backstagehøli

Umbyggingarnar í Kelduni gera, at møguleikarnir fyri at hava backstageøkið á staðnum batna, sigur Terje.

- Í fjør vóru backstagehølini í gomlu Kelduni, men í ár verða tey í syðra endanum í nýggju Kelduni. Nýggju rúmini rigga sera væl til júst hetta. Tey hava beinleiðis útgongd, so at siga beint við útipallin, og tí eru tey uppløgd at brúka sum backstagehøli. Eisini er lætt at sleppa til frá innipallinum. Í hvussu er lættari enn gamla Keldan var.

## Bert ein inngongd

Ein onnur broyting á festivalinum er, at í ár verður bara ein inngongd inn á festivaløkið í mun til tvær í fjør. Alt økið verður avhegnað. Terje sigur, at tað gjørdist ov ringt at yvirskoða báðar inngongdirnar, og lættari er at halda skil á einari inngongd. Tó eru møguligar neyðútgondir nógvastaðni á økinum. Møguleiki er at lata alt økið upp, um vandi skuldi borist á, og tá er frítt at fara allastaðni. Á Fjarðafestivalinum ynskja tey at ganga høgt upp í trygdina. Tey hava fingið profesionella hjálp við at seta hegnið upp, soleiðis at hetta verður gjørt á tryggasta hátt. Eisini um ódnarveður skuldi brostið á, leggur Terje Vestergaard afturat.